# Vegadeildin úr at gera



*Fleiri kavaruddingarmaskinur vóru at síggja í býnum*

**Teir arbeiða um náttina, og teir arbeiða um dagin. Teir rudda høvuðsvegirnar, eins væl og teir eisini hjálpa eldri fólkum í kavanum. Vit hava verið ein kavaruddingartúr við vegadeildini hjá Klaksvíkar Kommunu**

KAVARUDDING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Teir eru júst farnir til kaffi, tá vit fáa fatur á teimum. Eftir at hava arbeitt í meir enn trý døgn út í eitt, eru teir heldur troyttir.

Men í morgun er formaðurin komin við rundstykkjum og øðrum leskiligum, so lagið er gott hóast alt.

Tað eru mennirnir á vegadeildini hjá Klaksvíkar Kommunu, vit tosa um.

Tá kavi legst yvir býin, er tað teirra uppgáva at fáa hann burtur av vegnum, so klaksvíkingar ótarnaðir kunnu halda fram við gerandisdegnum.

Andras Joensen er formaður í vegadeildini í Klaksvík, og hevur hann úr at gera hesar dagarnar.

Tó gongur bert ein lítil løta, áðrenn hann stendur uttanfyri dyrnar hjá Sosialinum.

– Eg havi ikki so góða tíð at tosa beint nú, men kom tú bara við í bilin. So kunnu vit tosa saman, meðan eg koyri runt, sigur hann.

## Arbeiða nátt sum dag

– Vit hava arbeitt út í eitt í fleiri dagar nú, fortelur Andras, meðan vit koyra runt í Klaksvíkini.

– Vit hava eini 15 mans til arbeiðis, og hesir koyra uppá skift bæði nátt og dag. Sjálvur fór eg upp einaferð í nátt, og tá sá eg, hvussu nógvur kavi hevði lagt seg. Eg ringdi til nakrar av monnunum, og sendi teir út at grava. Teir fóru so heimaftur fyri løtu síðani, og nakrir nýggir komu ístaðin. Men soleiðis koyrir tað, greiðir Andras frá.

Hetta kann sjálvandi gerast strævið fyri mennirnar, men tíanbetur plagar kavin bara at liggja í nakrar fáar dagar.

## Nógvar uppgávir

Meðan vit koyra, tosar Andras fyri tað mesta í telefon. Fólk ringja allastaðni frá, og vilja tey hava vegadeildina heim á teirra økið at rudda.

Eisini onkur eldri kona ringir, sum ikki sleppur út um dyrnar fyri kava. Hon fekk ikki keypt inn í gjár, og er av tí sama komin í neyð. Hon vil hava onkran heim til sín at rudda fyri úthurðini, so hon sleppur út.

– Tey ringja allatíðina um alt møguligt. Men okkara fremsta uppgáva er at rudda høvuðsvegirnar, so ferðslan gongur, sum hon skal.

Tó hava vit sett eini 5 mans av, sum einans koyra út til eldri fólk, har teir so hjálpa teimum við ruddingini. Eisini hava vit onkuntíð koyrt heitan døgurða heim til teirra, so tey sleppa frá at fara út um dyrnar. Men her er talan um heilt serlig viðurskifti; sum oftast mugu fólk sjálvi rudda teirra egna tún, sigur Andras.

## Fólk ónøgd

Tað sigur seg sjálvt, at stóru kavaruddingarmaskinurnar hjá kommununi ikki klára at rudda tún fyri fólk. Men Andras greiðir frá, at fólk eisini eru ónøgd við, at privatir bilar standa undirkavaðir, tá fólkini skulu avstað við teimum.

– Hetta er sum so ikki okkara uppgáva. Men um fólk høvdu hugsað seg eitt sindur betur um, so hevði hetta ikki verið ein trupulleiki, sigur hann.

– Sum oftast eru bilarnir settir báðumegin vegin, og tá er torført hjá okkum at rudda so væl, sum vit vildu ynskt. Um fólk ístaðin bert settu bilarnir tí eini megin, so høvdu vit sloppið betri framat allastaðni, og so hevði hesin trupuleiki ikki verið til staðar, sigur Andras.

Við hesum í huga takka vit fyri túrin. Andras hevur úr at gera, og skal sleppa aftur til arbeiðis.



*Á hvørjum vegi stóðu menn uttanfyri og ruddaðu kavan burtur*



*Ikki er lætt at sleppa inn í hendan bilin*



# Skúlarnir avlýstir



*Skúlagongdin hjá flestu næmingum í landinum gjørdist av ongum orsakað av nógva kavanum*

**Flestu skúlarnir í landinum vórðu noyddir at avlýsa skúlagongdina mikudagin. Ringa veðrið gjørdi í flestum førum atkomumøguleikarar nar so mikið vánaligar, at neyðugt var at avlýsa**

KAVAÓDN
*Heri á Rógvi*

Tað máttu vera gleðiboð hjá flestu skúlanæming-unum í Føroyum, tá Útvarp Føroya bar boðini um, at flestu skúlarnir í landinum máttu avlýsa skúlagongdina mikudagin. Ringa veðrið gjørdi tað í flestu førum ómøguligt at hava vanliga skúlagongd. Boðini um nógvu avlýsingarnar streymaðu frá upplesaranum í Útvarpi Føroya um áttatíðina í mikumorgunin.

## Lærarar vantaðu

Karin Hammer er skúlastjóri í Kollafjarðar skúla, og hon varð noydd at avlýsa skúlagongdini hjá sær mikudagin. Orsøkin var tann, at flestu lærararnir koma aðrastaðni frá, og tað var ikki møguligt hjá teimum at koma til arbeiðis. Teir 122 næmingar í Kollafjarðar skúla koma flest allir við bussi í skúla, og hesin koyrdi ikki mikumorgunin, so næmingarnir skiltu, at eingin skúlagongd var á skránni.

Tað sama skilið var hjá Kvívíkar skúla, har Bjarni Heinesen er skúlastjóri. Tey 51 børnini í Kvívíkar skúla sluppu undan undirvísing mikudagin. Orsøkin var eins og í Kollafirði, at lærararnir ikki sluppu til arbeiðis, tá flestu teirra búgva aðrastaðni enn í Kvívík. Børn koma eisini frá grannabygdunum, og tað var eingin bussur hjá teimum at koyra við.

Ragnar Magnussen, stjóri á Handilsskúla í Havn, visti sær heldur eingi onnur ráð enn at avlýsa skúlagongdina mikudagin. Tað vil so siga, at tað var skúlagongdin hjá FHS og HH, sum varð avlýst. Øll onnur undirvísing seinnapartin og um kvøldið var á skránni sum vanligt.

Ragnar sigur, at veðrið var so mikið vánaligt í Marknagili og næmingar koma eisini aðrastaðni frá, soleiðis at hann varð noyddur at avlýsa, men hann heldur aftaná, at skúlagongdin hevði kunnað hildið fram frá kl. 10 á morgni. 230 næmingar ganga á Handilsskúlanum sum FHS og HH næmingar. Tveir næmingar vóru á veg í skúla, men hesir máttu taka til takkar við einum frídagi.

Fyri aðruferð í 17 ár varð skúlagongdin á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum avlýst. Ringa veðrið gjørdi tað ógvuliga trupult at fáa fólk í skúla, tí m.a. koma nógvir næmingar av bygd. Eisini er ringt at koma oman í skúlan, og skúlastjórin vildi ikki risikera trafikkaos í býnum, tá nógvu lærararnir og næmingarnir skuldu avstað í skúla.

## Fingu ikki lýst

Flestu av skúlastjórunum, ið Sosialurin tosaði við fíltust á, at tað var so mikið trupult at fáa hendur á nøkrum í Ùtvarpi Føroya fyri at avlýsa skúlagongdini. Tað var tó bert í einum einstøkum føri, at næmingar vóru komnir í skúla, tí í flestu førum var eingin bussur at koyra tey í skúla, og tað vóru óivað eisini mong, ið settust aftur uttan nærri tilmæli.

Úr Útvarpi Føroya verður sagt, at áðrenn klokkan átta kunnu fólk venda sær til tíðindadeildina við lýsingum av hesum slag, sum hava skund, tí latið verður ikki upp fyrr enn kl. 8 at taka ímóti vanligu lýsingunum. Hann heitir á fólk í tílíkum støðum um heldur at senda teldubrøv ella fax.



## Væl koyrandi millum bygdir

KAVARUDDING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Norðoyggjar:** Frá Landsverkfrøðinginum siga tey, at eingin trupulleiki skuldi verið millum bygdirnar her norðuri.

– Vit hava tríggjar manns til arbeiðis, sum rudda vegirnar, og har er væl koyrandi nú. Teir fóru til arbeiðis klokkan 04.45 mikunáttina, og hava teir grivið líka síðani tá.

Annars var nógv rok, tá teir fóru til arbeiðis, so hetta hevur tarnað arbeiðinum eitt sindur. Men tíanbetur batnaði veðrið skjótt, so um 7-tíðina mikumorgunin var aftur koyrandi.

## Kavin órógvar ikki

KAVIN
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Frá politistøðini frætta vit, at teir síðstu dagarnir hava verið friðaligir, hóast tann nógva kavan.

– Vit vita bert um ein bil, sum koyrdi út av vegnum. Men hetta var ikki nakað álvarsamt, hann slapp uppaftur og eingin skaði hendi.

– Annars hevur alt verið stak friðarligt. Vit hava onga fráboðan fingið av nøkrum slag, og fólk duga bara væl at ansað sær í slíkum veðrið. Harafturat er so væl grivið bæði í býnum og millum bygdirnar, kavin ikki hevur tarnað ferðsluni nakað serligt, siga tey frá politistøðini.